# DÓMARARNIR SKULU HAVA FRIÐ AT DØMA



Fyri tveimum árum síðani var nógv kjakast um, hvør rockbólkurin Krit átti at vunnið eina innleiðandi kapping. Samskiparin av Prixnum heldur, at øll verða ongantíð samd um dømingina, men at núverandi skipan er góð.

Mynd: Jens Kr. Vang

**– Dómararnir til Prix Føroyar eru anonymir, tí teir skulu hava frið at døma, og tí viðurskiftini í Føroyum eru so smá, sigur Fróði Vestergaard, samskipari av Prix Føroyum**

DØMING

*Eyðun Klakstein,*
*eydun@sosialurin.fo*

Einki Prix Føroyar uttan at dømingin í kappingini fær okkurt glepsið. Soleiðis er aftur hesaferð, og á heimasíðuni Pop.fo verður í hesum døgum kjakast um, hvussu dømingin í kappingini er og kanska átti at verið.

Fólk eru ikki samd. Summi halda, at núverandi skipan er tann frægasta og mest praktiska, meðan onnur halda, at dómararnir skuldu verið navngivnir, og at bólkarnir skuldu fingið eina stutta meting av teirra framførslu.

Eisini ummælarin hjá Sosialinum til fyrsta innleiðandi umfarið í Prixnum sóknaðist eftir eini grundgeving frá dómarunum um, hví teir døma, sum teir gera.

– Tað er undrunarvert og margháttligt, at fyrireikararnir ikki krevja, at tey, sum døma, saman skulu orða nakrar heilt fáar linjur niður á blað, og síðani geva tað til teir ávísu bólkarnar, skrivaði Tór Verland Johansen í blaðnum mikudagin.

## Best við ónevndum dómarum

Samskiparin av Prix Føroyum, Fróði Vestergaard, hevur verið oddamaður í kappingini øll árini, og hann hevur fyrr upplivað, at kjakast hevur verið um dømingina í kappingini.

Hann heldur tó, at núverandi skipan er góð og rættvís, og hann heldur, at dómararnir framhaldandi skulu vera anonymir.

– Dómararnir til Prix Føroyar eru anonymir, tí teir skulu hava frið at døma, og tí viðurskiftini í Føroyum eru so smá. Um fólk vita hvør dømir, verður ov nógv fokus sett á persónin í staðin fyri tónleikin. Tey flestu av teimum sum døma krevja eisini, at tey skulu verða anonym, tí okkara skipan leggur upp til hetta við individuellari døming, sigur Fróði Vestergaard.

– Luttakarnir vita, tá ið tey melda til Prixið, at dómararnir vanliga eru anonymir. Undanfarnu kappingar – umleið 26 umfør umframt 5 finalur – eru dømdar av anonymum dómarar. Hava úrslitini ikki verið í lagi, spyr Fróði Vestergaard.

## Nógvir tónleikarar døma

Dómararnir til Prix Føroyar verða valdir av umboðum fyri Norðurlandahúsið, Føroya Undirhaldstónleikarafelag (FUT), Útvarp Føroya og Sjónvarp Føroya. Hesi velja sjálvir síni umboð til dómarabólkin.

– Dómarnir eru fólk, sum hava tónleikaførleika, og tey eru í flestu førum virknir tónleikarar og hava breiða fatan av tónleiki. Tá dómararnir verða útnevndir, verður atlit tikið til gegnisviðurskifti Tað vil siga, at vit hyggja eftir, um persónlig viðurskifti eru, sum tala fyri, at einstaki dómarin er ógegnigir. Hetta verður gjørt til hvørt umfar, sigur Fróði Vestergaard.

– Tað finst nokk einki úrslit, sum øll folk í Føroyum eru samd um, men Prix Føroyar hevur sera nógvar dómarar, so tað átti at givið eina rímiliga døming.

## Døma hvør sær

Fyrireikararnir av Prix Føroyum leggja dent á, at teir 10 dómararnir, sum eru til hvørt innleiðandi umfar, døma hvør sær. Teir skulu ikki tosa við hvønn annan, meðan bólkarnir spæla, ella áðrenn teir hava latið sítt skoðsmál.

– Tað er ein krevjandi uppgáva at døma til eitt slíkt tiltak, tí viðkomandi skal allatíðina lurta samsvarandi teim krøvum, ið eru ásett til dømingina. Onkrir av dómarunum hava drúgvar royndir sum dómarar, meðan onnur royna seg fyri fyrstu ferð. Vit meta ikki, at tað er klókt at skifta allar dómararnar samstundis, tí royndirnar vísa at eisini, at henda dømingin krevur eisini venjing og royndir, sigur Fróði Vestergaard.

Dómarnir vita tí ikki, hvat úrslitið er, fyrr enn fráságumaður kunnger hetta á pallinum. Dómarnir døma inviduelt og hava bara 10 prosent ávirkan á samlaða úrslitið.

## Eingin grundgeving

Til fyrstu Prix Føroyar kappinginar høvdu áhoyrararnir ávirkan á úrslitið, men fyri nøkrum árum síðani fingu áhoyrararnir sekkin sum dómarar.

– Aðrastaðni eru tað áhoyrarnir, ið avgera vinnaran, men hetta meta vit ikki er nakað, sum altíð gevur tann rætta vinnaran. Hetta tí royndir vísa, at fokus beinanvegin verður flutt frá dygdarmetingini til eina lokal meting, tað vil siga hvaðani í landinum bólkarnir koma, heldur Fróði Vestergaard.

Tað verður eingin grundgeving latin fyri dømingina til bólkarnar. Hví kunnu dómararnir ikki lata bólkunum eina stutta meting av teirra framførslu?

– Eg veit bara ikki, hvør av dómarunum skal gera metingina. Eg haldi, at best er, at journalistar, ummælarar og onnur koma við teirra egnu meting av tí sum hendi, sigur Fróði Vestergaard.

## DØMINGIN

**10 fólk – bæði menn og kvinnur – meta um avrikini hjá bólkunum í teimum innleiðandi umførunum. Tey skulu geva stig fyri hesar fimm tættir:**

- Framførsla.
- Soloavrik innan sang og ljóðføri.
- Samanspæl ella programmering.
- Tónlistarligar dygdir yvirhøvur.
- Aðrar dygdir.

Dómararnir kunnu lata hvørjum bólki í mesta lagi fimm stig fyri hvørt av punktunum. Tað vil siga, at ein bólkur kann fáa í mesta lagi 250 stig.

## NÓGVIR VINNINGAR

- Høvuðsvinningurin til Prix Føroyar 2005 er ein vika í danska Lundgaard Studios. Mentamálaráðið og Atlantic Airways lata vinningin.
- Listastevna Føroya - august 2006 - bjóðar vinnaranum av Prix Føroyar kappingini at spæla á Listastevnuni 2006.
- Jelling Musikfestival saman við Atlantic Airways - mai 2005 - velur í minsta lagi ein bólk ella einstakling frá Atlantic Music Event.
- NIBE-Festival saman við Atlantic Airways - juni 2005 - velur í minsta lagi ein bólk ella einstakling frá Atlantic Music Event.
- Ólavsøkukonsertin 2005 - Vinnarin og ein bólkur frá hálvfinaluni í Suðuroynni verða tveir av bólkunum á Ólavsøkukonsertini.
- G-Festivalurin - velur fyrst ein bólk frá hálvfinaluni í Suðuroy og minst ein Prix-bólk frá Atlantic Music Event.
- Musikhuset VEGA í Keypmannahavn bjóðar minst einum bólki ella einstaklingi frá Atlantic Music Event at spæla í VEGA í 2005.
- Summarfestivalurin 2005 - velur ein bólk frá hálvfinaluni í Suðuroy og minst ein bólk frá Atlantic Music Event.
- Nipiaa Rockfestival í Aasiaat í Grønlandi - august 2005 - bjóðar í minsta lagi einum bólki ella einstaklingi frá Atlantic Music Event at spæla á rockfestivalinum 2005.
- AIRWAVES í Íslandi - oktober 2005. Møguleiki verður latin upp fyri at fáa føroyskar bólkar at spæla á Airwaves 2005.
- »Peace & Love Festivalurin« í Svøríki bjóðar minst einum bólki ella einstaklingi frá Atlantic Music Event at spæla í Svøríki summarið í 2005.